Viðmerking

Fiskavirking og Royal Greenland

Í Sosialinum 2. febr. í ár verður stjórin í Føroya Fiskavirking endurgivin fyri at siga, at tað hevði staðið illa til í Føroyum um Fiskavirking ikki kom.

Undirritaði eri grundleggjandi ósamdur við honum.

Við stovanini av Fiskavirking varð stórt sæð øll innanlands kapping um fiskin køvd.

Hetta sæst best við, at tað í fleiri førum hevur loyst seg betur hjá føroyskum bátum at avreiða feskan fisk í Íslandi enn í Føroyum, sum annars hevur verið heilt ókent fyribrigdi í allari mínari tíð.

Tað, sum fær meg at gera viðmerkingar til samrøðuna við stjóran í Føroya Fiskavirking er tað, sum hann sigur um Royal Greenland, ið varð nýtt sum fyrimynd tá Fiskavirking varð stovnað.

Stjórin sigur, at nú taka øll undir við Royal Greenland, men hetta er ikki rætt, tí hvørki privatu reiðaríini ella fiskimenninir taka undir við Royal Greenland, sum hevur monopol uppá fiskiídnaðin á landi og lata ein undirprís fyri rækjur, tosk og svartkalva.

Slíkt letur seg bert gera so leingi eingin kapping er, men nú royna grønlendingar sjálvir at bróta monopolið.

Í Innaarsuit hevur Polar Seafood gjørt nýggja verksmiðju til keyp og framleiðslu av svartkalva úrdráttum og í Nuuk gera Polar Seafood saman við privatum rækjubátum nýggja rækjuverksmiðju.

Myndin er júst tann sama sum í Føroyum.

Royal Greenland hevur alt ov stóra framleiðsluorku á landi og tá felagið ikki vil selja nøkur virki til onnur samstundis sum teir lata undirprís fyri rávøruna, verða nýggj virki gjørd og tann frammanundan ov stóra framleiðsluorkan hjá Royal Greenland økist bert tilsvarandi.

Í grønlendska blaðnum Sermitsiak nr. 5 frá 2. febr. í ár viðgera leiðarin og tvær blaðgreinir spurningin, sum eisini eigur at hava stóran áhuga hjá okkum og Sosialurin biðist tí um at seta hesar í óbroyttum líki í blaðið.

Tað, sum nú hendir í Grønlandi, hava vit longu sæð her heima, har nýggj verksmiðja letur upp í Leirvík við síðuna av verksmiðjuni hjá Fiskavirking.

Aðrastaðni í landinum verður byrjað í smáum, men tað verður ikki leingi, fyrr enn nýggj virki verða gjørd í nógvum av teimum øskukøldu plássunum.

Ger Fiskavirking ikki skjótt av og selir stongdu virkini uttan treytir, vænti eg, at um stutta tíð verða hesi ikki seljandi, tí manglandi viðlíkahald og strangari heilsukrøv frá keyparum okkara, fara at gera tað bíligari at byggja nýggj virki við síðuna av verandi mølposavirkjum.

Í samrøðuni við stjoran, sigur hesin seg ikki ivast í, at Fiskavirking sum tann mishátti dúnungi verður til svana sum frálíður, men eg eri tíverri vísur í, at hesin dúnungin, ið var misháttur í føðingini, fer líka misháttur í grøvina líka mikið hvussu gamal hann verður.

Tórshavn 6. febr. 1996

Aksel Hansen



NR. 5 1996 3

De private trawlere vil bygge rejefabrik i Nuuk

Royal Greenland betaler fem kroner for lidt for delandingspligtige rejer. Derfor mener de private rederier, det kan betale sig at drive egen fabrik, siger direktør Hans Pavia Egede, Polar Seafood Greenland

Privat hellefiskefabrik i Innaarsuit

Polar Seafood har netop åbnet fabrikken til 18 millioner kroner. Lokalbefolkningen er begejstrede, oplyser administrerende direktør Hans Pavia Egede

Sund udvikling

(Se i øvrigt artiklerne på side 3 og 4)

PIZZA-VINIR

Hevur tú hug at fáa eina ella fleiri **PIZZA** inn á gólvið, so ring **tlf. 18866**, og tú hevur PIZZA'ina innan ein tíma.

Vit í **PIZZARIA** royna altíð at hava kostnaðin so lágan sum møguligt, soleiðis at kundin bert rindar 30 kr. fyri heimkoyringina. *Hetta tilboð er tó bert galdandi fyri viðskiftafólk í Tórshavn.*

Vit vóna, at hetta tilboð kemur væl við.

PIZZARIA
Tlf. 18866

Pizzaria
Tlf. 18866

Útisetabókin '96

– telefonbókin yvir føroyingar uttanlands er komin

Einaferð føroyingur – altíð føroyingur

Sum kunnugt, so er talið av føroyingum, sum flyta av landinum, vaksið støðugt seinastu árini. Fáur man ivast í hvør orsøkin til hesa øktu fólkaflyting er. Landið er í kreppu og ein vaksandi partur av fólkinum missir arbeiðið. Sum so ofta fyrr, tá ið illa hevur staðið til heima á klettunum, missur føroyingurin ikki mótið, men leitar sær burtur í onnur lond at fáa sær arbeiði ella nema sær útbúgving. Hetta, at fólk flyta av landinum, er sostatt ikki nakað nýtt fyribrigdi, og ofta verður havt á munni, at føroyingar finnur tú um allan heimin.

Hetta, at talið av útisetum alsamt gerst størri, hevur sjálvandi broytingar við sær, ikki minst í Føroyum, men eisini í útisetaumhvørvinum í londunum uttan um okkum.

Einaferð føroyingur – altíð føroyingur. Soleiðis kenna helst flestu føroyingar tað, hvar teir so enn búgva í heiminum. Hetta sæst eisini á teimum mongu føroyingafeløgunum, sum útisetar seta á stovn. Í hesum feløgum koma føroyingar saman um føroysku mentanina, sum t.d. føroyska dansin, sangin og ikki minst føroyska matin. Útisetar hava eisini blaðið Oyggjaskeggjan, og onkunstaðni eru teir eisini farnir undir at senda føroyskt nærvarp. Hetta verður alt gjørt fyri ikki at missa føroyska samleikan, hvar tú so ert staddur í heiminum.



ÚTISETABÓKIN – telefonbók yvir føroyingar sum búgva uttanlands

Nú um dagarnar hevur eitt nýtt útisetatiltak sæð dagsins ljós. Beint fyri jól kom fyrsta útgávan av Útisetabókini, sum er telefonbók yvir føroyingar, sum búgva uttanlands. Upprunaliga ætlanin var, at bókin einans skuldi fevna um føroyingar, sum búgva í Danmark, men eftir fleiri áheitanir varð avgjørt, at bókin skuldi fevna um allar føroyingar, sum búgva uttanlands.

Fyrireikingarnar til bókina byrjaðu á vári 1995, og ætlanin var at bókin skuldi koma út á heysti sama ár. Men skjótt varð greitt, at trupult fór at verða at savna flestu føroyingar uttanlands í fyrstu útgávuni. Tí varð avgjørt at fyrsta útgávan skuldi vera ein roynd at vita, hvussu áhugin fyri tílíkari bók var.

Móttøkan av fyrstu útgávuni av Útisetabókini hevur verið betri enn væntað, og meta stigtakararnir, at grundarlag er fyri bókini, og er ætlanin at bókin skal koma út á hvørjum ári, næstu fer á heysti 1996.

Útisetabókin er fyrst og fremst ætlað sum ein hent telefonbók, sum bæði útisetar og fólk heima í Føroyum kunnu nýta. Ætlanin er tó, at annað viðkomandi tilfar eisini skal fáa innivist í bókini, so sum kunning um útisetafelagsskapir o.tl. Í hesi fyrstu útgávuni eru greinir um ymiskar vinnur, ið byggja á náttúrligt tilfeingi, eitt nú ull, vatn og olju. Umframt hesar greinir er ein ferðafrásøgn frá Vestmannabjørgunum, ið er eitt sera vælumtókt ferðamál hjá bæði føroyingum og fremmandum vitjandi.

Fyri at røkka málinum at Útisetabókin skal vera ein telefonbók yvir allar føroyingar, ið búgva uttanlands, er sera umráðandi, at føroyingar kring knøttin fáa at vita um bókina. Heitt verður tí á øll um at siga ætt, vinum og kenningum kring heimin frá, soleiðis at hesi eisini kunnu vera við í komandi útgávum av Útisetabókini.

Útisetabókin '96 er at fáa í bókahandlunum í Tórshavn, í Føroyahúsinum í Keypmannahavn og fæst eisini við at venda sær til útgávufelagið á tlf. 32887001 ella 86103904. Kostnaðurin fyri bókina er 50 kr. íroknað porto.